# BØNARLØTAN

NOVEMBER 2021 36. árg.

## 1. Mánadagur Áp. 16.22-40



Solomon biður fyri familjum, ið hava fingið børn



Um 20 børn í sunnudagsskúla

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura, Reuben 8, Micah 8**

Vit takka Harranum! Vit vóru 67 á leguni í okt. Vit hava nú fingið nýggjan leiðara til barnaarbeiðið í samkomuni. Hetta er stór hjálp. Seinastu tíðina eru eisini nógv nýggj fólk komin aftrat í samkomuna.

## KRINGVARPIÐ

5. des. kl. 17 Útvarpsmøti úr Betesda, Klaksvík
12. des. kl. 16 Sjónvarpsmøti úr Lívdini, Hoyvík

## EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 21 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## *2. Týsdagur* — *Hoseas 1.1-2.1*



**DANMARK, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 14, Andreas12, Kristina 10**
**Sólva og Jákup Hansen**
**Susan og Øssur Berghamar**

Vit hava samband við fleiri eldri føroyingar. Tíðin við koronu var ikki løtt hjá mongum teirra. Eingin seniorsamkoma hevur verið leingi, men nú vóna vit at hava hesa samkomu aftur í des. mánaði.

## *3. Mikudagur* — *Hoseas 2.2-23*



**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

Nurimar skal undirvísa á missiónsskúlanum í Kolumbia nakrar vikur. Nú er trupult at vitja ættarbólkarnar, tí trot er á bensini. Ein túrur inn í ættarbólkin eftir ánni kostar 20.000 kr. í bensini. Vit gleðast um, at bíbliuskúlin kundi byrja aftur í okt. eftir langan koronusteðg.



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
Umsetingarráðgevin kemur væntandi aftur í nov. at kanna nøkur av brøvunum, eg havi umsett. Eisini hjálpi eg unga umsetaranum við 2. Mósebók. Hann nú er trúlovaður ungari kvinnu her úr bygdini. Biðið, at hon og familja hennara koma til trúgv. Pápi hennara lesur nógv í Skriftunum og hevur ofta spurningar, men er ongantíð komin til bíbliutíma. Hon kennir onki til Skriftirnar. Vit biðja, at Harrin varðveitir unga umsetaran, tí nógv í bygdini finnast at sambandinum millum hann og kvinnuna.

**ZAREPTA**
Biðið, at Orðið, ið varð sáað á legunum, ber ávøkst.

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 13**
STEVN endaði fyri nøkrum vikum síðan. Nú er ætlanin at hava STEVN á heimasíðuni við fleiri øðrum líknandi programmum. Nógv møtir liggja fyri framman. Biðið fyri heilsu okkara.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelen, Josva 12, Ester 11, Samuel 7**



## *5. Fríggjadagur* *Áp.17.1-18*



### USA, Alabama, NTM
### Judy og Óli á Grømma Jacobsen

Bæði fingu koronu beint eftir, at vit komu til Alabama. Vit hava tað betri, men eg stríðist við møði. Vit skuldu verið á NTM-fundi fyri leiðarar í Teilandi 8.-12. nov. Tiltakið, sum er 4. hvørt ár, verður nú hildið á netinum vegna Covid-19. Eg skal tala á fundinum.



### USA, North Carolina
### Charlotte, Calvary Church
### Gudny og John Munro

John hevur nú eisini dagligar radiosendingar, sum kallast The Verdict. Biðið, at sendingarnar bera nógvan ávøkst, og at trúgvandi verða uppbygd.

## *6. Leygardagur* *Áp. 17.19-34*



### ÍSLAND, Akureyri
### Kristín Gerðalíð

Ætlanin hjá mær er at flyta til Reykjavíkar, meðan eini hjún í samkomuni har umhugsa at flyta til Akureyrar. Vit ætla at samstarva næstu árini um at røkka út til fólk kring landið. Vit samskipa hetta við OM. Í løtuni søki eg arbeiði í Reykjavík.

### ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn
### Rósa og Jógvan Purkhús
### Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn

## 7. Sunnudagur — Hoseas 3.1-4.19



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Ætlanin er nú at endurskoða Ápostlasøguna. Biðið fyri umsetingini og heilsu okkara.

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 17, Victoria 15, Emma Grace 13,**
**Jónatan 12, Markus 9, Evita 6, Joy 4**
Her í Puruándiro er nógv rúsevnismisbrúk millum heilt ung. Sum samkoma royna vit at vera ljós í myrkrinum og áhaldandi at prædika evangeliið.

## 8. Mánadagur — Hoseas 5.1-15



**PAPUA NÝGUINEA**
**Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**
Gleðiligt, at fleiri koma til møtini, og at nakrir ungir menn aftrat nú bjóða sær til at hjálpa at umseta Matteusar evangelium. Hetta er annað ættarliðið av kristnum her.



**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**
Tað var vælsignað at vera í Eysturríki saman við ECM trúboðarunum, sum tá hittust fyri fyrstu ferð í tvey ár. Vit eru í Føroyum til 22. nov. Vil onkur samkoma hava okkum at vitja, so sigið frá á dorit.marshall@ecmi.org ella á 270286.

## *9. Týsdagur* *Áp. 18.1-28*



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 15, Lydia 4**

Harrin hevur signað barna- og ungdómsarbeiðið í heyst. Fleiri familjur aftrat koma nú til familjumøtir og fleiri bæði í sunnudagsskúla og á ungdómsmøti. TeenStreet hevur eisini havt samansjóðandi ávirkan.

## *10. Mikudagur* *Áp. 19.1-20*



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Vit takka Harranum fyri góða heilsu, hóast korona herjar kring okkum. Dubby mennir støðugt podcast og heimasíðu – sí www.facingdeathwithjoyfulhope.fo. Saafi-umsetingin av 1. Mósebók er nú góðkend og verður vónandi skjótt prentað. Tosið við okkum á ZOOM. Okkara rás verður opin fríggjadagar seinnapart frá kl. 16 – kotan er 454-729-6150. Onki loyniorð!



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 15, Rebekah 13, Lydia 11**

***NB:*** *Í dag verða fimm sjónvarpsandaktir tiknar upp í KvF at senda í 2022.*

## *11. Hósdagur* *Rutt 1.1-22*

**NTM – FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 10, Tabita 7, Debora 6, Natan 3**

Vit gleðast um, at North Cotes College nú er viðurkent og skrásett hjá BAC (British Accreditation Council). Tað merkir, at skúlin framhaldandi kann taka ímóti altjóða næmingum. Biðið, at Harrin signar starvsfólk, lærarar og næmingar á skúlanum.

★ Í dag fyllir Noah Elias Hansen 10 ár

## *12. Fríggjadagur* *Áp. 19.21-41*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Samkoman var partur av mentanarnáttini í Glostrup, har nógv fólk vitjaðu í Glostrup Frikirke til suppu og kaffimunn. Fleiri vóru fyrstu ferð á gátt hjá okkum. Ynski okkara er, at tey verða vakt og grípa tað æviga lívið.

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**



Vit eru Harranum sera takksom fyri, at tvey deyv skulu doypast 14. nov. Takk, at tit minnast okkum í tænastuni.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**



## *13. Leygardagur* *Hoseas 6.1-11*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Vit hava gingið frá leguhúsunum fyri veturin og frosttryggjað. Juvel skal so takast upp og gerast vetrarklárur, og síðani Juveleeraq. Av tí at vit regluliga hava tørv á serlækna, ferðast vit hiðani 16. nov., vitja á vegnum børnini í Danmark og koma at halda jól í Føroyum.

## *14. Sunnudagur* *Hoseas 7.1-16*

**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**
**Ane og Filip Sivertsen, Kristian 17**
**Anne-Sophie og Óli Tindalíð,**
**Liljan 16, Leanne 15, Luckas 2**

Tørvur er á, at fleiri eldri og yngri grønlendingar taka lut í at styrkja og menna andaliga vøksturin í samkomuni.

**Juvel II**



Kundi tú hugsað tær, og kennir tú teg leiddan at rætta okkum eina hjálpandi hond, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Karstin Hansen, samskipara, á tel. 285007 ella á karstenhansen1944@gmail.com.

**– Anna og Óli Steinberg**

## *15. Mánadagur* *Áp. 20.1-16*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Vit skulu greiða fýra ymiskum samkomum í Kalifornia frá arbeiðnum í Qasigiannguit og Norðurgrønlandi. Biðið fyri trygdini á ferðini. Tríggjar familjur í Qasigiannguit mistu ungdómar í sept.



**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 14**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Maria og Jens Bech**

## *16. Týsdagur* *Áp. 20.17-38*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

16.-21. nov. skal eg samráðast við tveir í leiðsluni hjá NTM Europa norðan fyri Barcelona. Biðið fyri Harrans leiðslu á fundunum. Ætlanin var hjá syninum Hans og familjuni at flyta til Miðasia í okt., men av tí at at elsti sonurin breyt armin, varð tað útsett. Tey vóna at flyta síðst í nov.



**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Megan 17, Trisha 9, Emma 5**

## *17. Mikudagur* *Hoseas 8.1-14*



**ÍRLAND**
**Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Arbeiðið í samkomuni byrjar aftur, nú koronuavmarkingar verða tiknar av. Gud virkar á undurfullan hátt, og vit vænta enn meira. Guðrun arbeiðir framhaldandi, Karina er á læristovni, Timothy hevur farloyvi frá skúlanum í eitt ár. Sonja, Dan og Lydia hava tað øll gott. Vit takka fyri allan stuðul.

## *18. Hósdagur* *Rutt 2.1-23*



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 12, Nana 10, Louie 7, Rio 2**

Tvær mammur við trimum synum koma nú á møti hjá okkum, og senda dreingirnar í sunnudagsskúla. Tær hava enn ikki játtað trúgv, men siga seg kenna góða ávirkan á seg og á børnini. Onnur hevur katólska bakgrund. Biðið, at tær og børnini koma til trúgv.

⋆ Í dag fyllir Kristian Sivertsen 17 ár

## *19. Fríggjadagur* *Hoseas 9.1-17*

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Nøkur toymi hava ferðast til landslutir, har ongi kristin eru. Nøkur eru nú komin til trúgv. Menniskju eru til reiðar at lurta; tí biðja vit, at fleiri samverkafólk koma. Eftir langa tíð í Onglandi fara vit nú aftur til Turkalands í nov.



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 4, Timon 2**

Vit komu til Goroka á ráðstevnu og at hvíla okkum. Ráðstevnan varð síðani avlýst av koronu. Tíbetur komu vit í samband við aðrar trúboðarar, sum eisini vóru komnir. Vit eru troytt eftir seinastu mánaðirnar í Kovol. Biðið, at vit finna betri javnvág í tænastuni.



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 13, Noah 12, Karis 8,**
**Judah 6, Ethan 4**

Biðið, at Gud komandi fýra árini opnar dyr fyri evangeliinum í bygdunum Pakia, Mile, Mukulu og Muro. Hetta fer at hava við sær stórar broytingar. Biðið um framhaldandi vøkstur í arbeiðnum, serliga fyri ungum hjúnum. Biðið, at Anton kemur heilt fyri seg aftur eftir viðgerð fyri álvarsaman blindtarmsbruna. Okkum tørvar samverkafólk, og at heimaskúlahjálpararnir fáa neyðugu loyvini skjótt, so teir kunnu verða her innan ársskiftið.



**TÝSKLAND**
**Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 10**

## *21. Sunnudagur* *Áp. 21.1-17*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 11, Leah Ève 7, Abigail 3**

Eg havi í mong ár droymt um at gerast størri partur av Guds verki her í Nantes. Gud hevur givið okkum nógvar hættir at virka, hóast vit bæði arbeiða fulla tíð. Harrin hevur nú lagt mær á hjarta at brúka meiri tíð í verkinum, og vit standa tí fyri eini stórari avgerð, um eg skal siga arbeiði frá mær ella arbeiða niðursetta tíð í framtíðini. Okkum tørvar Guds leiðslu.

## *22. Mánadagur* *Áp. 21.18-40*

**FØROYAR**
**Vanja og Svein í Prestgarði**
**Jenny 14, Svend 13, Terji 9, Petra 7**

Eg ætli at hava møtir í Lopra og tónleikaframleiðslu í 2022. Seinast í nov. fara vit Danmarkar. Eg haldi eisini fram við fleiri Sóttarløtum á Facebook. Biðið, at Harrin frelsir og signar.

**– Birgit og Svenning av Lofti - Atlantic Mission**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

## *23. Týsdagur* *Hoseas 11.1-11*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Biðið, at almennu myndugleikarnir fáa bilbugt við hesi ræðuligu Covid-19 smittuni. Vit hugsa um hetta bæði í sambandi við tímiligu og andaligu vælferðina hjá fólki.

## *24. Mikudagur* *Hoseas 12.1-15*



**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 5, Jude 3, Evelyn 1**
Biðið fyri heilsustøðuni hjá Brian og fyri okkum øllum, nú vit bíða eftir, at Harrin skal vísa okkum røttu løtuna at fara til Papua Nýguinea. Vit eru takksom, at passið hjá Elliot og Brian er afturkomið frá myndugleikunum eftir bert ein mánað.
⋆ Í dag fyllir Megan Guttesen 17 ár

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

## *25. Hósdagur* *Rutt 3.1-18*



**Elam Ministries**
**Margretha Højgaard Poulsen**
Navnið Elam er at finna í Bíbliuni. Elamittar vóru eisini við hvítusunnudag í Áp. 2. Í dag verða kristin atsøkt í Iran. Loyvt er ikki at halda møti ella flyta inn bíbliur á iranska høvuðsmálinum farsi. Hóast hetta er áhugin fyri kristindómi vaksandi.



**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 17, Rebekka 16,**
**Hanna 13**

## *26. Fríggjadagur* *Áp. 22.1-30*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 16, Aron 9, Noah Kristian 7**

Vit eru sera takksom, at skúlin hjá børnum okkara aftur er opin eftir at hava verið stongdur í 6 mánaðir. Tað er gott hjá børnunum aftur at hava samband við onnur, og hetta gevur okkum eisini meira tíð til at tæna trúboðarum í Asia.

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen, Ryan 12**

## *27. Leygardagur* *Áp. 23.1-15*



**OM, SUÐURAFRIKA**
**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja Mortensen**

Støðan við koronu er góð í løtuni, so vit eru takksom fyri, at vit kundu fara á vikuskiftislegu við 30 børnum í okt. Vit fyrireika nú ungdómsleguna 3.-5. des. Harumframt fyrireika Kurt og eg eisini brúdleyp í des. Eg takki fyri forbøn.


**Útgevari** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd** Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057
**Uppseting** Palli Skorheim, tel. 290087

## 28. Sunnudagur Áp. 23.16-35



### FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM
### Liz og Ragnar Niclasen

Biðið, at umsókn okkara at venda aftur til Filipsoyggjar verður játtað. Tey trúgvandi í ættarbólkunum eru rakt av koronu og kunnu t.d. ikki ferðast sum vanligt millum bygdir. Vit luttaka í samkomuarbeiðnum her í Kanada, men halda eisini á at skriva tilfar til kankanay samkomurnar.

***NB:*** *Seinasta sjónvarpsmøtið í ár verður tikið upp í Lívdini í dag.*

## 29. Mánadagur Hoseas 13.1-15



### OM – LOGOS HOPE

Hannah Berghamar og Noomi Jóhanna Eysturtún eru umborð. Logos Hope fer nú til Vesturafrika, til Sahel, økið frá Senegal til Eritrea. Har búgva um 150 mió. fólk, og sera fá hava hoyrt gleðiboðskapin.


**Myndasavn** pallis76@yahoo.dk
**Prent** Føroyaprent, tel. 314555
**Teldupostur** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða** www.kbs.fo



©KBS. *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

*30. Týsdagur* *Hoseas 14.1-10*

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## NÝGGJ BÓK!

**488 síður 290 Kr.**




Í søguligu skaldsøguni lýsir Lynn Austin hendingar, tá ið jødarnir vóru í útlegd í Bábel. Søgan hjá jødum og heidningum verður samantvinnað. Hon lýsir trúnna, ivan og líðingar hjá menniskjum, sum verða umrødd í Nehemiasar og Esters bók. Við frásagnum hjá teimum, sum vóru í útlegd, síggja vit, hvussu kærleiki Guds til fólk sítt er óbroytiligur og gevur vón í truplastu umstøðum.

Jákup Nolsøesgøta 17, Tórshavn
Opið mán.-frí. kl. 14:00-17:30
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo